# Heimarøktin øki 1 Suðurstreymoy

## lýsir eftir heilsuatstøðingum og heilsuhjálparum

Í samband við, at starvsfólk fara í heilsuhjálpara-skúla og til feriuavloysarar, verður søkt eftir røktar/-hjálparstarvsfólki at arbeiða í skiftandi vaktum til Heimarøktina í Suðurstreymoy frá 1. mai 2003 ella eftir avtalu.

Umsøkjarin verður settur í starv í Heimarøktini í Suðurstreoymoy, ið umfatar at arbeiða úti í býnum og inni á stovni.

Arbeiðið hjá heilsuhjálparum og heilsuatstøðingum fevnir um praktiska og persónliga hjálp til eldri borgarar í økinum. Harafturat arbeiðir heilsuatstøðingurin sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við sjúkrarøktarfrøðingar um borgarar, ið tørva røkt og viðgerð.

Ynskiligt er, at evt. umsøkjarar í umsóknini skriva hvar ynskt verður at arbeiða, starvstíð og hvørja vakt (dagvakt, kvøldvakt ella náttarvakt).

Meiri fæst at vita um støarvini við at venda sær til økisleiðaran ella varaleiðaran á tlf. 21 72 49 ella 21 14 84.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin Suðurstreymoy**
Skálatrøð 14 · FO 100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 15. apríl 2003**

# 25 ára hátíðarhald

***Leikhúsið Gríma***

framførir

***Per Gúnt***

eftir Henrik Ibsen

leikstjórn Eyðun Johannessen

á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **leygardagin** | **22. mars kl. 19.00 útselt** |
| **sunnudagin** | **23. mars kl. 18.00** |
| **týsdagin** | **25. mars kl. 19.30** |
| **mikudagin** | **26. mars kl. 19.30** |

Atgongumerki á kr. 125,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

**Søkt verður eftir**

# Pedagogi/-hjálparfólki

Vøggustovan við Velbastaðvegin søkir eftir 1 pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 15. apríl, ella eftir nærri avtali.

Vøggustovan er normerað til 41 børn í aldrinum 0-3 ár. Tríggjar stovur hava 10 børn hvør og ein stova hevur 11 børn.

Tann, ið settur verður, skal vera røkin, nærlagdur og álítandi, hava góð samstarvsevnir, og kunna taka ábyrgd.
Tú skal, saman við hinum starvsfólkunum, vera við til at geva børnunum ein mennandi gerandisdag við umsorgan, tryggleika og avbjóðingum.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður tað fyribils sett við fólki uttan pedagogútbúgving.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Kommunalu arbeiðsgevarafelagi og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi 30. mars 2003.

Nærri fæst at vita um starvið fáast við at venda sær til Elisabeth Henriksen, leiðara, ella Ann Jónsdóttir, varaleiðara.

**Vøggustovan við Velbastaðvegin**
Velbastaðvegur 39
FO-100 Tórshavn
Tlf. 314379 Fax 321179

# Bakaralærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt lærupláss at søkja.

Bakaríið hjá Gunleivi hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruise-skipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. proceseteknolog.

Lærutíðin til bakara er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**BAKARÍIÐ HJÁ GUNLEIVI**

**Tlf. 228838 ella 312161**

# Jørð á Selatrað til sølu

Við hesum verða 12 gyllin og 3 skinn í »Garðshaga Uttari« lýst til sølu.

Eisini verða tilsamans 5.678 $m^2$ av innangarðsjørð á Selatrað lýst til sølu.

Innangarðsjørðin umfatar matr. 10, Selatrað, sum er »Ytra Fornamørk«, sum er 5.281 $m^2$ til víddar og partar av matr. nr. 107, Selatrað, »Úti á Oyri«, sum er 392 $m^2$ til víddar.

Jørðin verður seld um hóskandi boð fæst.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Christian Andreasen, adv.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

# Hús í til sølu ella leigu

Húsini í Bókbindaragøtu 7 eru til sølu ella leigu. Húsini, sum eisini eru vælegnaði til vinnuligt endamál, eru í 2 hæddum á umleið 115 $m^2$ hvør. Til húsini er bilhús á 50 $m^2$, sum rúmar 2 bilum. Ovara hæddin er innrættað við 3 kømurum, køki, stovu, spísistovu, spísikamar, hjalli umframt wc og baðirúmi. Niðara hæddin er innrættað við 4 kømurum, køki, stovu, wc og baðirúmi.

Húsini kunnu leigast øll í einum ella hvør hædd í sínum leigumáli.

Áhugað kunnu ringja **313212, 513212** ella senda teldupost til **hdali@kallnet.fo.**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 13. mars 2003 samtykti broytingar í serstaku byggisamtykt nr. 12 fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaðanin er, at uml. 900 m2 av B-økinum (kannað urtagarðsøki) verður broytt til A-øki við teimum broytingum, at A-økið kemur at loyva almennar stovnar t.d. skúlar, soleiðis at ásetingarnar eisini koma at fevna um verandi Kommunuskúla

Tilfar, sum lýsir broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá mánadegi 24. mars 2003 til 14. apríl 2003, mánadag til fríggjadag frá kl. 9.30 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 24. juni 2003.

SNARSKIVAN



# BILSKROKK

## Lakkering & Plátuverkstaður




**TLF. 32 24 71 - 21 24 71**

Slættanesgøta 9 - Boks 2227 - Fo-110 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tórshavnar Ellis- og Umlættingarheim**

Á Tórshavnar Ellisheimi búgva 25 búfólk og á Tórshavnar Umlættingarheimi 8 búfólk.

26 starvsfólk starvast í teimum báðum bygningunum í V.U. Hammershaimbsgøtu 3 og 7.

Arbeiðsumhvørvið er gott.

www.torshavn.fo

## Frítíðaravloysarar

Tórshavnar Ellis- og Umlættingarheim søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsuatstøðarum, hjálparfólkum og køksfólki at avloysa í summar.

**Størvini**
Sjúkrarøktarfrøðingaarbeiðið umfatar sjúkrarøktararbeiðið á heiminum. Heilsuatstøðaraarbeiðið og hjálparfólkararbeiðið umfata alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d. eldrarøkt og reingerð.

**Setanarviðurskifti**
Arbeiðið er skipað í vaktum. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 311839, ella Helenu Poulsen, deildarskjúkrarøktarfrøðing, tlf. 315522.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. apríl 2003. Viðmerk á umsóknina: "avloysari".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Útibarnagarðurin í Havnardali**

Í útibarnagarðinum í Havnardali ganga 20 børn í aldrinum 5-7 ár.

Á stovninum eru 4 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

www.torshavn.fo

## Pedagogur til útibarnagarðin í Havnardali

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 30 tímar um vikuna til útibarnagarðin í Havnardali. Starvið verður sett skjótast til ber.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sigruna Davidsen, leiðara, tlf. 313321 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera útibarnagarðinum Spíranum, Havnardalur, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. apríl 2003.




P/f Fiskavirkið sóknast eftir tveimum framleiðsluatstøðingum og tveimum lærlingum.

**Framleiðsluatstøðingar**
Atstøðingarnir, ið vit sóknast eftir, skulu helst hava fiskivinnuútbúgving ella aðra miðnámsútbúgving.

Annar atstøðingurin skal stovna og skráseta framleiðslu, gera innanhýsis skrásetingar, og hava eftirlit við ráfiskamóttøku.

Hin atstøðingurin skal arbeiða við innanhýsis eftirliti, arbeiða við úrtøkuskráseting og gera royndir.

Báðir atstøðingarnir fara at starvast saman við formonnum og fólki í framleiðsluni. Dentur verður lagdur á leiðsluppgávur. Løn sambært avtalu.

**Lærlingar**
Nú ber til at útbúgva seg til fiskavirkara í Føroyum. Nýggja yrkisútbúgvingin tekur 3 ár. Á Fiskavirkinum eru tvey pláss til fólk, ið vilja hava hesa útbúgving.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu vera sendar okkum áðrenn 11. apríl 2003.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fyrispurnigar um størvini skulu stílast til Hartvig Joensen, virkisleiðara.

**FISKAVIRKIÐ**

Postrúm 29 · 510 Gøta · Tel 441002 · Fax 441766 · www.prg.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Útibarnagarðurin Glóðin**

Í Útibarnagarðinum Glóðini ganga 20 børn.

Á stovninum eru 4 starvsfólk.

Stovnurin er útibarnagarður so vit er nógv úti og náttúran hevur tí ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

Vit bjóða eitt áhugavert starv og tú fært høvi at gera tína ávirkan galdandi.

www.torshavn.fo

## Pedagogur til Útibarnagarðin Glóðina

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 40 tímar um vikuna til útibarnagarð við 5-7 ára gomlum børnum. Starvið verður sett skjótast til ber

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jensu Andreasen, leiðara, tlf. 322145/254533 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Útibarnagarðinum Glóðini, við Havnará, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. apríl 2003.

www.sosialurin.fo